# Við vitan og tolsemi byggja vit land

**VINNUSÍÐU-SJÓNARMIÐIÐ**

*Jóannes Eidesgaard*
*løgmaður*

Føroyar eru í broytingartíð, og skulu vit fóta okkum sum tjóð og hava støðugan búskaparvøkstur, so er ógvuliga umráðandi at skapa dynamikk í vinnuni. Er málið at veita hvørjum einstøkum borgara størri vælferð, soleiðis sum ætlanin er við Visjón 2015, so má búskapurin eisini vaksa, so at hann kann fíggja hesa vælferð.

Tí er at fegnast um, at kapping er íkomin um arbeiðsmegina, og tað er somuleiðis at fegnast um, at kappingin um tað vælútbúna fólkið er farin at vaksa.

Vanlig hugsan hevur verið, at vælútbúnir føroyingar, ið heim aftur koma, fáa oftari starv hjá tí almenna enn í vinnuni, av tí at vinnan hevur valt praktiskar lívsroyndir fram um bøkur og teori. Soleiðis er ikki longur, tí alt fleiri privatar fyritøkur síggja fyrimun í at kjósa sær vælútbúgvið fólk at brynja seg til kappingina, antin hon er føroysk ella útlendsk. Tað er ikki longur ein spurningur um at hava ráð ella hug at seta vælútbúgvið fólk í starv, tí nú eru ikki ráð at lata vera. Fólk við fakligari barlast er ein neyðug íløga og fyritreyt fyri vøkstri og nýmenning.

Nýggjar føroyskar útflutningsvinnur hava stungið seg upp seinastu árini – eitt nú fíggingarvinna, kunningartøkni og telesamskifti. Hesar vinnur vinna land á útlendskum marknaðum, og slíkum vinnum í altjóða kapping tørvar góða tøkni og evnarík fólk. Tá eru tær við til at eggja okkara vælútbúna fólki at koma heim aftur, so at tað kann vera við til at skapa eitt samfelag, ið byggir á vitanarbúskap.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður skrivar sjónarmiðið á Vinnusíðunum hesaferð*

## Tolsemi er fyritreyt

Tøkni, Talent og Tolsemi. Hetta eru tey trý T'ini, sum ein væleydnaður vitanarbúskapur byggir á sambært viðurkenda amerikanska rithøvundinum, Richard Florida. Tøkniliga eru vit rímiliga væl við, og kappingin um talentini – tey vælútbúnu fólkini – gerst alsamt størri.

Men tøkni og talent eru ikki nóg mikið. Tolsemi fullfíggjar tríhyrningin. Tí skulu vit byggja á vitanarbúskap, og skulu føroyskar fyritøkur standa seg í altjóða kapping, so at samfelag okkara veksur í altjóðagerðini, so mega vit hava tol fyri hvør øðrum.

Vit mega sýna tolsemi og loyva fjølbroytni, skapanargávum, tonkum og verumátum, ið vit ikki eru von við. Vit mega geva skapandi fólki hug at liva og byggja sína tilveru heima hjá okkum. Eggja teimum til at skapa og virka í Føroyum.

Tá víðka vit okkara talenttilfeingi og fáa fleiri kappingarfyrimunir. Tað er í ymiskleikanum, at nýskapanin sprettir og vit hugsa nýggjar tankar. Eru vit bert millum teirra, sum hugsa og hátta sær sum vit, so er vandi fyri, at vit køvast í egnari vanahugsan. Men at vera saman við menniskjum, ið hava øðrvísi bakgrund, samleika og mentan, fær okkum hinvegin at síggja nýggjar møguleikar í okkara egna heimi, og slíkt er alneyðugt í altjóðagerðini. Tí tann, sum skal stíga djarvt, skal hugsa djarvt.

## Halta beinið

Hyggja vit at okkum sjálvum, mega vit viðurkenna, at tað haltar við tolseminum hjá fleiri okkara. Hetta halta beinið darvar okkum og ger, at vit mennast ikki so skjótt, sum vit annars kundu – menniskjaliga eins væl og vinnuliga.

Ágangurin móti samkyndum vísir, hvussu lítið vit tola. Trýstið á littar fótbóltsleikarar sigur somu søgu. At so fáar kvinnur hava vald í Føroyum ber somuleiðis boð um okkara skerda hugsanarlag. Bert fyri at nevna nøkur dømi. Vit mega viðganga, at størsta forðing okkara fyri framburði yvirhøvur er okkara egna snævurskygni. Men til tess at køva hetta snævurskygni er neyðugt við lærdómi og íblástri uttanífrá. Vit mugu víðka sjónarring okkara.

Eitt tolsamt samfelag er eitt betri samfelag, og tað fær fleiri borgarar at trívast. Og sum við samfelagnum er eisini við fyritøkum. Tann fyritøka, sum hevur tol, eigur betri møguleikar at nýmenna seg, og hon gerst kappingarførari og áhugaverdari at arbeiða fyri. Og hetta stuðlar aftur upp undir búskap og samfelag okkara, so at vit kunnu varðveita og vaksa um ta vælferð, ið vit øll hava sett okkum sum skjaldarmerki.

Soleiðis byggja vit land.




Marknaðarrák

# Norður Korea lítla ávirkan enn

Eftir at Norður Korea royndarsprongdi eina kjarnorkubumbu í vikuskiftinum, er yvirgangur aftur við at gerast eitt evni á politiska pallinum. Um tað gongur illa við royndunum at fáa landið at rætta seg eftir krøvunum frá umheiminum, kann hetta eisini gerast eitt evni á marknaðunum. Hendingin ávirkaði tó marknaðirnar óvanliga lítið um vikuskiftið. Partabrøv hildu á at hækka flest alla staðni. Oljuprísurin hækkaði tó upp um 60 dollarar fyri tunnuna. Norður Korea hevur onga olju, og prísurin hækkaði, tí oljuframleiðarar gjørdist á einum máli um at minka oljuframleiðsluna 3%-4%. Oljuprísurin tykist koma fyri seg, eftir at hann lækkaði um 25% í avgust-septembur.

## Lánsbrævarentur óbroyttar

Lánsbrævarentur hækkaðu nakað í farnu viku. 10-ára danska rentan er í løtuni 3,80%, og tað er 0,10% lægri enn 1-árs rentan. Hetta merkir, at lánsbrævaíleggjarar lítlan og ongan ótta bera fyri hækkandi prísvøkstri í løtuni.

## OPEC leggur trýst á fraktratur

Sum nevnt omanfyri hevur OPEC avgjørt at lækka oljuframleiðsluna við 3%-4%, tað er 1 mió. tunnum um dagin. Hetta minkar um fraktina úr Miðeystri. Marknaðirnir hava spekulerað í, at hetta fór at henda, um oljuprísurin kom niður um 60 dollarar fyri tunnuna. Hesar spekulatiónir hava verið við til at lækka fraktraturnar í Miðeystri um 20% higartil hendan mánaðin. Lækkandi fraktratur leggja trýst á kursirnar hjá fraktfeløgum sum til dømis Torm og A. P. Møller – Mærsk.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna fara virðisbrævamarknaðirnir væntandi at fylgja við gongdini í Norðurkorea og oljuprísinum. Eisini kemur eitt upprit frá amerikanska tjóðbankanum, har útlitini kunnu ávirka marknaðirnar.

Vika 41

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 591,95 | 1,1% | ↑ |
| JPY | 4,97 | -0,1% | ↓ |
| GBP | 1.105,25 | 0,0% | → |
| NOK | 88,52 | -0,9% | ↓ |
| SEK | 80,04 | 0,2% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,22 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 114,06 | 1,0% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 570,00 | -3,6% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 105,97 | 0,4% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*